Skemt




MYNDIR: POLFOTO

# Alt fyri fótbóltin

Kvinnur plaga at líða fyri vakurleikan og útsjóndina, men rættir menn teir offra útsjónd og vakurleika fyri fótbóltin. Hesin maðurin eitur Phil Andruss, og hann er íðin viðhaldsmaður hjá amerikanska fótbóltsfelagnum Seattle Sounders. AP veit at siga, at hann brúkti tveir tímar til at fáa hárið at sita, sum tað skuldi – tað svarar til umleið helvtina av tíðini, sum eitt konufólk brúkar til tað sama.

## Triggjar góðar

- Konan segði við meg, at hon skuldi ikki hava nakra føðingardagsgávu í ár, men hon helt, at vit heldur skuldu gera okkurt annað saman.
- Gjørdu so tit tað?
- Ja, vit skeldaðust um, hví eg ikki hevði keypt henni nakra føðingardagsgávu.

Eitt innbrot var í ein handil í Havn í vikuni. Onkur stjól 2000 sigarettir og ein pakka av gularótum, so nú leitar løgreglan eftir einari kanin við tubbakshosta.

- Segði tú nakað góða?
- Nei
- Okay, so má tað hava verið roykalarmurin



# Einki stuttligt meira

Tað plagar at verða ein stuttligur og góður dagur, tá ið fólk fara at halda karnival í Køln í Týsklandi. Men nú hevur svínakrímið beint fyri tí stuttleikanum eisini. Fólk plaga at heilsa pent og kyssa hvønn annan, men nú verður alt gjørt við masku fyri andlitið. Men yvirskriftin fyri karnivalið í ár er framvegis “Kissed in Cologne”.

## Í RANGA STRÚPAN

**Hvør má skráin vera?**
Lúsafundur
*Olivant.fo*

**Nýtt sosialt netverk**
Ein bólkur á Facebook er nú farin undir innsavnan...
*Olivant.fo*

**Ikki so naskur, gamli!**
Barroso vil hava Connie Hedegaard
*Uf.fo*

**Nýggjar tíðir**
Miðlakríggj á netinum
*Olivant.fo*

**Hvat plagdu tey at gera?**
Nú arbeiða tey á Kósini
*Sosialurin*

**Ja, heilt erligt!**
Nú eiga mannfólkini tørn
*Norðlýsið*

**Nú manglar bara restin av kroppinum**
Hava funnið fingrarnar av Galilei
*Dimma*

**Kanska uf.fo verður dagført so**
Kringvarpsgjaldið hækkar 100 kr. næsta ár
*Uf.fo*

## UMAFTURAFTURUM
HØGNI DJURHUUS



# Kringgongd

Landsstýriskvinnan í mentamálum, ella mentamálaráðharrin, tá vit spæla fólk í húsi, kann av sínum eintingum, einsamøll uttan at spyrja nakran, hækka kringvarpsgjaldið. Hon skal bara broyta eitt tal í kunngerðini um kringvarpsgjald og síðani senda Kunngerðablaðnum kunngerðina og biðja um at fáa hana kunngjørda. Og so hækkar kringvarpsgjaldið. Meira enn tað krevst ikki.

Men tað torir landsstýriskvinnan í mentamálum sjálvandi ikki. Tí mentanarligar hugsjónir og visjónir, um nakrar eru, viga minni, nógv minni, enn atkvøður og tað, sum hini í samgonguni halda.

Og fyri at sleppa sær heilt undan ábyrgdini og heimildini at áseta kringvarpsgjaldið er landsstýriskvinnan (t.e. landsstýrið) komin við einum lógaruppskoti, sum flytur avgerðina úr Mentamálaráðnum í løgtingið. Kringvarpsgjaldið, krónutalið, skal í lógina um Kringvarpið.

Lógaruppskotið sigur, at kringvarpsgjaldið er 3.000 kr. frá 2010 at rokna. Og soleiðis verður í allar ævir. Løgtingið fer ongantíð at hækka gjaldið, heldur tvørturímóti.

Jú, men, ger tann skarpi lesarin nú vart við, tað eru heilar 100 kr. meira enn nú (og meira til landskassan eisini í meirvirðisgjaldi, 425.000 kr. um árið).

100 kr. meira geva 1,7 milliónir afturat til Kringvarpið, tí 17.000 húsarhald eru. Men teir pengarnir skulu sjálvandi ikki brúkast til journalistikk. Pengarnir skulu brúkast til fólk við breki, fólk, sum bera brek fyri at vera heilt politiskt korrektur í orðavalinum.

Mentamálaráðið brúkar pengar hjá Kringvarpinum at reka almannapolitikk fyri. Annars fæst ikki meiriluti fyri at hækka gjaldið. Minnist til, vit eru í Føroyum.

Politikkararnir ræðast eitt sterkt kringvarp. Tí vandi er fyri, at teir fáa spurningar, sum teir ikki klára at møsna seg uttanum. At teir koma í fokus og ikki sleppa úr tí aftur.

Eftir meira enn 52 ár við útvarpi og meira enn 25 ár við sjónvarpi, meira enn hálva øld við Public Service, er tann fyrsti føroyski Public Service sáttmálin á veg.

Fyri at hava sítt alibi hundrað prosent í lagi fekk landsstýriskvinnan í lag aðalorðaskifti í løgtinginum. Hon veit, at løgtingið vil einki við Kringvarpinum.

Tað var ein óvæntað snild avgerð at leggja saman Útvarpið og Sjónvarpið overnight. Tað vóru ein góð ráð, landsstýrismaðurin tá fekk, hvaðani tey so komu.

Við samanleggingini slapp landsstýrismaðurin undan teirri plágu, sum øll undanfólk hansara síðani 1984 runnu undan – øll runnu ikki nóg skjótt – marran, sum var, at Sjónvarp Føroya hevði ongar pengar. Men Útvarp Føroya átti nógvar pengar.

Nú eigur Kringvarp Føroya ongar pengar. Men kassin var ikki heilt tómur, fyrr enn faðirin at Kringvarpi Føroya var farin úr Mentamálaráðnum. Væl var sloppið.

Eingin tordi, ella torir, at siga bart út, at vit eru ov fá í Føroyum til at hava sjónvarp. Politikkararnir hvørki vilja ella tora at lata tað, sum eitt líkinda sjónvarp kostar.

Nú skal eisini takast við her, at tað er eingin sjálvsagdur sannleiki, at fleiri pengar geva betri kringvarp. Eitt kallast raðfesting, ein stórliga undirmett dygd í Føroyum. Pengar til dømis kunnu raðfestast, eisini fáir pengar.

Lítið, kanska einki, er meira subjektivt enn raðfesting.

Hví hava vit í Føroyum altíð ráð til at gera berghol og undirsjóvartunlar? Tí politikkararnir raðfesta tey fremst.

Ein drykkjukona ella -maður hevur altíð ráð til brennivín, tí tey raðfesta tað fremst.

Allir føroyingar eiga bil, tí føroyingar raðfesta bilin fremst.

Sum sagt í hesi kringgongd um kringvarpsgjald eru altíð pengar til tað, sum verður raðfest fremst.